# Hósdagur 30. mai

## SVF

18.25 DV í kvøld
18.30 Pocahontas 16:26
19.00 Borð um borð 2:7 e
20.00 Dagur og Vika
20.20 Kjak
20.50 Sálin á ranguni 1:6 - donsk røð
21.20 Ally McBeal
22.05 Krimitímin: Undir illgruna 3 1:2
23.50 Liðugt

## EUROSPORT

7.30 Tennis - Grand Slam Tournament French Open
8.30 Golf - U.S. P.G.A. Tour Memorial Tour United States
9.30 Olympic Games - Olympic Magazine
10.00 Tennis - Grand Slam Tournament French Open - Live
14.30 Cycling - Tour of Italy
16.30 Tennis - Grand Slam Tournament French Open - Live
19.00 Tennis - Grand Slam Tournament French Open - Live/Delayed
20.00 Tennis - Grand Slam Tournament French Open
21.00 Football - Inside the Teams
21.30 Football - One World / One Cup
22.00 News - Eurosportnews Report
22.15 Football - Gillette Dream Team
23.15 Football - Inside the Teams
23.45 Superbike - Superbike Mag
0.15 News - Eurosportnews Report

## BBC PRIME

0.00 TLZ: »Journeys to the Bottom of the Sea – The Lost Fleet«
1.00 TLZ: »Horizon – Planet Hunters 2000«
2.00 TLZ: »Forum – The Next Big Thing«
2.30 TLZ: »Sounds – What have the 80's ever done for us?«
2.40 TLZ: »Bites – Science Bites – Super Rackets«
2.45 TLZ: »Talks – Background Brief - The Science of Ageing«
3.00 TLZ: »Apples, Risks and Recriminations«
3.50 TLZ: »Ewcut – Ever Wondered?«
4.00 TLZ: »Blood on the Carpet – Nightmare On Wall Street«
4.40 TLZ: »Science in Action – Electricity & Magnetism«
5.00 TLZ: »The French Experience – Societies«
5.15 TLZ: »The French Experience – Loisirs Et Fetes«
5.30 TLZ: »English Zone«
6.00 Smarteenies
6.15 Bits & Bobs
6.30 Yoho Ahoy: »Blow«
6.35 Toucan Tecs: »High Flyers«
6.45 Playdays: »Dot Stop«
7.05 Bright Sparks
7.30 Celebrity Ready Steady Cook
8.00 Holiday Snaps: »Australia/Great Barrier Reef«
8.15 Real Rooms: »Feltham Lounge«
8.45 Going For A Song
9.15 Wild And Dangerous: »Birdman of the Amazon«
9.45 Vets in Practice: »Change of Heart«
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »The Happiness Patrol«
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 Miss Marple: »A Murder is Announced« - Part Three
13.30 Celebrity Ready Steady Cook
14.00 Holiday Snaps: »Worcestershire/France/Leeds«
14.15 Smarteenies
14.30 Bits & Bobs
14.45 Toucan Tecs: »High Flyers«
14.55 Playdays: »Dot Stop«
15.15 Totp Eurochart
15.45 All Creatures Great & Small: »A Friend for Life«
16.45 Ainsley's Big Cook Out
17.15 Gardeners' World
17.45 The Weakest Link
18.30 Doctors
19.00 Eastenders
19.30 2 Point 4 Children: »Family Plot«
20.00 The Sculptress
21.00 Bottom: »Apocalypse«
21.30 The Men Who Changed Football
22.15 Fish Tales:Billingsgate
23.05 Casualty

## BBC WORLD

0.00 BBC News - followed by Weather
0.30 HARDtalk (r)
1.00 BBC News - followed by Weather
1.30 Holiday (r)
2.00 BBC News - followed by Weather
2.30 Europe Direct (r)
3.00 BBC News - followed by Weather
3.30 Asia Today (r)
3.45 World Business Report (r)
4.00 BBC News - followed by Weather
4.30 HARDtalk
5.00 BBC News - followed by Weather
5.30 World Business Report
6.00 BBC News - followed by Weather
6.30 World Business Report
7.00 BBC News - followed by Weather
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News - followed by Weather
8.30 Holiday (r)
9.00 BBC News - followed by Weather
9.30 HARDtalk (r)
10.00 BBC News - followed by Weather
10.30 Europe Direct (r)
11.00 BBC News - followed by Weather
11.30 Asia Today
11.45 World Business Report
12.00 BBC News - followed by Weather
12.30 HARDtalk (r)
13.00 BBC News - followed by Weather
13.30 World Business Report
13.45 Sport Today
14.00 BBC News - followed by Weather
14.30 Top Gear (r)
15.00 BBC News - followed by Weather
15.30 Asia Today
16.00 BBC News - followed by Weather
16.30 HARDtalk (r)
17.00 BBC News
17.15 World Business Report - followed by Weather
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News - followed by Weather
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News - followed by Weather
20.30 Click Online
21.00 BBC News - followed by Weather
21.30 World Business Report
22.00 BBC News - followed by Weather
22.30 The Money Programme
23.00 BBC News - followed by Weather
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

## 3

5.00 Garfield og venner
5.25 Børnehjørnet
7.00 TV-Shop
8.00 Lassie på nye eventyr
8.25 Ricki Lake
9.15 Ricki Lake
10.10 Horton-sagaen
11.00 Horton-sagaen
11.55 Once & Again
12.50 Family Law
13.45 Popular
14.35 Med på moden
15.05 Bette
15.35 Ricki Lake
16.30 Simpsons
17.00 Alle elsker Raymond
17.30 Vild med dig
18.00 Sjov og Spas
18.30 Blossom
19.00 Skadestuen
20.00 Dawson's Creek
21.00 Sex & the City
21.45 The Guardian
22.45 Seinfeld
23.15 Simpsons
23.45 Ti tommelfingre
0.15 Walker Texas Ranger
1.15 Ricki Lake
2.05 Træneren
2.35 Træneren
3.05 Ti tommelfingre
3.30 Sunset Beach
4.20 Herkules - de unge år
4.45 Godnat

## ÚF

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Sverri Steinhólm, prestur, lesur
7.15 Barnaløtan
7.30 Tíðindi
7.35 Morgunrásin - Bjarni Mohr og Dia Midjord skipa fyri
8.00 Tíðindi
8.03 Morgunrásin
9.00 Tíðindi
9.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Sverri Steinhólm, prestur, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 1
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm leggur til rættis
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e) - Sigmar Bláberg skipar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Femja Petersen velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum
18.00 Barnaløtan (e)
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Tilvera: Hvagar gongur leiðin? - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 Stuttsøgan »Húsvillur« - Martin Joensen skrivaði. Olivur Næss las
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

## Rás

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Annika B Mortensen leggja til rættis
11.00 Tónleikur
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.30 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14.05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Annika B Mortensen leggja til rættis
16.00 Tónleikur
17.00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Jeremias profetur (7:12) - Zacharias Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
22.00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 359993 Fax: 359990 E-mail: girlzone@ras2.fo
0.00 Liðugt

## Lindin

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
13.30 Sjómansendingin á ranguni »Við fuglfiringum á Zarepta« við M. C. Resteroff (e)
14.30 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen
16.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending
20.00 Barnalindin endursending frá Sunnudegnum
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C. H. Spurgeon
21.00 Bønarlinjan beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevnir kunnu ringjast inn frá kl. 20.00 Tlf. 321377 og fax á nr. 321379
0.00 uml. Dagsins Orð eftir Svenning av Lofti
2.00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna (e)
3.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
6.00 Vit gevast

## Tilvera: Hvagar gongur leiðin?

ÚF Hóskvøldið kl. 19.00

Felagsskapurin Pro Vita fylti 10 ár herfyri. Tá var lektarin Torben Riis í Føroyum og helt fyrilestur. Í sendingini tosar Armgarð Arge við hann um, at alt tað tøkniliga, sum stendur okkum í boði, ger tað torført at laga etikkin til vandamál sum kloning, aktiva deyðshjálp og selektivan abort.

## Sálin á ranguni 1:6

SVF Hóskvøldið kl. 20.50

– Donsk røð

Eitt sjónvarpslið hevur fylgt gerandisdegnum á eini deild fyri sálarsjúk á sjúkrahúsinum í Hvidovre. Her síggja vit, hvussu vanlig fólk skulu taka støðu til stórar spurningar í lívinum, tí á hesa deildina kemur tú, tá tað myrkir í sinninum og tilveran syndrast.

## Skadestuen

Hesin parturin: Mark finnur útav, at svulsturin er komin aftur, og at hann hevur bara fýra ella fimm mánaðar eftir at liva í. Corday er flutt á hotel, og fortelur fyri Benton, at hon er farin frá Mark. Anny uppdagar at málið ímóti Brian er droppað, tí hann er vorðin sundurbankaður.




## Ti tommelfingre






Búskapur og vinna:

### Laksasjúka breiðir seg

Ein laksasjúka, sum herfyri varð funnin í laksi á einari alistøð í norsku Finnmørkini, er nú eisini funnin í Troms. Í báðum støðum er tað laksur, sum varð settur út í fjør, sum er vorðin sjúkur.

Myndugleikarnir siga, at laksurin á alistøðini í Troms stavar frá smoltstøðum ymsastaðni í Noregi, men at einki samband er millum hendan laksin og laksin á teirri smittaðu alistøðini í Finnmørkini. Báðar alistøðirnarhava fingið boð um at taka laksin í teimum ringunum, sum sjúkan er funnin í, men u m - hvørvisverndarfelagsskapurin Bellona hevur kravt, at allur laksurin á teimum báðum alistøðunum verður tikin alt fyri eitt.

### Snýtt fyri 150 mió.

So hvørt sum norsku tollmyndugleikarnir koma longur í at kanna pappírini hjá norskum fiskaútflytarunum, veksur talið á virkjum, sum hava sent russiskan fisk til ES-marknaðin sum norskan fisk. Tollvaldið hevur nú kannað 18 útflytarar, og har vísir tað seg, at umleið helmingurin av útflutningspappírunum eru falsað. Higartil snýr tað seg um eini 34.000 tons av toski, hýsu og upsa, og í pengum hava útflytararnir svikað fyri einar 150 mió. krónur, sigur tollvaldið. Tað mesta svikið umfatar tosk, sum er sendur til Danmarkar, men talan er eisini um tosk, sum er sendur til týska marknaðin.

Norska tollvaldið hevur boðað frá, at tað fer at kanna pappírini hjá 18 fiskaútflytarum afturat.

### Keypa skipini kortini

Líkt er til, at Ørskov-skipasmiðjan í Frederikshavn kortini fær pengarnar fyri trolararnar, sum skipasmiðjan á sinni bygdi til Russlands, men sum russar ikki hava verið førir fyri at gjalda. Eitt russiskt leasingfelag hevur nú sagt seg vera til reiðar at veita trygd fyri 220 mió. krónum. Roknað verður við, at tey neyðugu pappírini verða avgreidd ínæstu viku, og at tann fyrsti trolarin kann latast russum um fjúrtan dagar.

UTTAN ÚR HEIMI

# Brynja seg til kríggj, men vóna frið



*Indiskir hermenn á veg til markið í Kashmir. India hevur væl fleiri hermenn enn Pakistan, men hernaðarserfrøðingar siga, at teir pakistansku hermenninir hava betri útbúgving og venjing enn teir indisku.*

**Pakistanski forsetin sigur, at landið er til reiðar at verja seg ímóti indiskum álopum, men hann vónar, at partarnir kunnu samráða seg fram til eina loysn.**

KASHMIR-STRÍÐIÐ
*Árni Joensen*

Aftan á ein fund í trygdarráðnum hjá stjórnini í gjár segði pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, at bæði hann og stjórnin fordøma allan yvirgang sum tann, ið var upprunin til ta spentu støðuna í landslutinum Kashmir. Forsetin legði dent á, at felagsskapir, sum skipa fyri tílíkum yvirgangsatsóknum, og sum siga seg gera tað sum lið í stríðnum um Kashmir, sleppa ikki at virka í Pakistan.

– Pakistan hevur ein týðandi lut í stríðnum ímóti yvirgangi, og landið kann tí ikki góðtaka nakað slag av yvirgangi, segði pakistanski forsetin. Hann legði afturat, at pakistanska stjórnin er samd um, at verandi støða eigur at verða loyst við samráðingum.

Pervez Musharaf lat tó ongan iva vera um, at Pakistan framhaldandi fer at veita fólkinum í Jammu og Kashmir moralskan, politiskan og diplomatiskan stuðul í stríði tess fyri sjálvsavgerðarrætti.

Tvær ferðir áður hava India og Pakistan verið í kríggi um Kashmir, fyrru ferð í 1948 og seinnu ferð í 1965, og nú er aftur vandi fyri, attey bæði londini bresta saman. Seinastu tíðina hava tey flutt meiri enn eina millión hermenn til markið í Kashmir. Bæði londini hava kjarnorkuvápn. Serfrøðingar halda, at India hevur einar 80 kjarnorkuløðingar og Pakistan 25, og seinastu dagarnar hava USA, ES, Bretland og Arabiska Samgongan heitt á londini um ikki at leypa framav, men at loysa kreppuna við samráðingum.

Seinastu dagarnar hava nøkur lond mælt sínum ríkisborgarum til at rýma úr India og Pakistan. Í gjár kunngjørdi avstralska uttanríkisráðið, at tað hevur mælt øllum avstralskum ríkisborgarum til at fara úr Pakistan. Starvsfólkini á avstralsku sendistovuni í Islamabad verða tó verandi í landinum.

India leggur Pakistan undir at fíggja, venja og vápna víðgongdar islamskar felagsskapir, sum síðani 1989 hava stríðst fyri sjálvstýri og sameining við Pakistan. Pakistan sigur harafturímóti, at landið einans veitir felagsskapunum moralskan stuðul.

# Upprunafólk sleppa ikki at veiða hval

**Onnur lond leggja USA undir at tosa við tveimum tungum, tá tað snýr seg um hvalaveiði.**

HVALAVEIÐA
*Árni Joensen*

USA, sum í mong ár hevur gingið á odda í stríðnum ímóti hvalaveiði, legði brádliga á hin bógvin á fundinum hjá altjóða hvalaveiðinevndini IWC, sum er í Japan. Mikudagin skjeyt amerikanska sendinevndin up at loyva upprunafólkinum í Alaska, inuittunum, at veiða 56 hvalir, og at upprunafólk í Russlandi skuldu fáa loyvi at veiða fimm hvalir. Amerikansku umboðini hildu tað vera rímiligt, at upprunafólk fingu hesi rættindini.

Men uppskotið fall, tá IWC viðgjørdi tað í gjár.

Hvalaveiðitjóðir sum Noreg og Japan funnust at USA og løgdu landið undir at tosa við tveimum tungum. Norðmenn og japanar vístu á, at hvalasløgini, sum amerikanska uppskotið snúði seg um, eru í vanda fyri at verða útruddað, meðan tað hinvegin er nóg mikið til av sildreka, sum Noreg og Japan veiða, men sum USA er ímóti.

Amerikanski sendinevndarformaðurin, Michael Tillman, legði hvalaveiðitjóðirnar undir at hava atkvøtt ímóti upprunafólkinum fyri at hevna, at bannið ímóti hvalaveiði ikki verður sett úr gildi.

Serliga japanar ilskaðust um amerikanska uppskotið. Tað kemst av, at IWC týsdagin havnaði einari japanskari umsókn um at sleppa at veiða 50 sildrekar afturat.

Úr Norðurlondum:

### Viðgerð uttanlands

Í 1998 settu donsku myndugleikarnir sær fyri, at munandi fleiri krabbameinssjúklingar skuldu fáa stráluviðgerð á teimum donsku sjúkrahúsinum. Málið var at økja talið á viðgerðum 65 prosent tey næstu fimm árini, men kanningar nú vísa, at hetta letur seg als ikki gera. Kanningarnar vísa, at viðgerðartalið er vaksið 25 prosent síðani 1999.

Orsøkin er í fyrsta lagi, at sjúkrahúsini hava ikki nóg mikið av starvsfólki til at taka sær av stráluviðgerðunum, og tað hevur havt við sær, at støðugt fleiri danskir krabbameinssjúklingar, sum skulu hava stráluviðgerð, verða sendir til sjúkrahúsini í Kiel og Flensborg í Týsklandi. Á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn verður sagt, at har vænta tey at senda einar hundrað sjúklingar av landinum til viðgerðar í ár.

### Fleiri verða smuglað

Norska løgreglan sigur, at talið á útlendingum, sum biðja um uppihaldsloyvi í Noregi, er vaksið sera nógv í ár. Í januar vaks talið heili 205 prosent samanborið við januar mánað í fjør. Higartil í ár eru 6.000 útlendingar komnir til Noregs og hava biðið um uppihaldsloyvi. Í fjør komu 14.700, men løgreglan væntar, at talið í ár kemur upp í 18.000.

Leiðslan í norsku løgregluni sigur, at nógvir útlendingar verða smugl-aðir til Noregs, og at mannasmuglarar eftir øllum at døma hava lagt seg eftir at smugla fólk inn um norska markið. Norska løgreglan vísir á, at alt fleiri útlendingar koma til Noregs, samstundis sum talið minkar í Danmark, Týsklandi og Niðurlondum.

### Illir ferjueigarar

Feløgini, sum eiga ferjurnar, sum sigla millum Danmark og Svøríki, eru í øðini um, at politikararnir ætla at gera tað bíligari at koyra eftir brúnni um Oyrasund. Reiðaríini siga, at prísfallið fer at taka grundarlagið undan ferjunum, og teir hótta tí við at krevja endurgjald, hvørja ferð tað verður bíligari at nýta tað fasta sambandið um Oyrasund.